# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 27. januar 2009, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Jón Mikkelsen, Evelyn Gaard, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

**Til viðgerðar fyri opnari hurð:**

**Mál 1**
Staðfesting av valinum av kommunalum nevndum.
J.nr. 2009-002
Umsitingin mælir bygdarráðnum at staðfesta valið av kommunalum nevndum, ið fór fram á fundi tann 28. november 2008.

**Viðv. mál 1**
Valið av kommunalum nevndum varð einmælt staðfest.

**Mál 2**
Setanarbrøkurin hjá borgarstjóranum.
J.nr. 2009-030
Umsitingin mælir Bygdarráðnum at seta setanarbrøkin til 1 at galda frá 1. januar 2009.

**Viðv. mál 2**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 3**
Persónar, sum saman við borgarstjóranum skulu hava heimild til at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.
J.nr. 2009-031
Umsitingin mælir til at geva Herit Magnussen, varaborgarstjóra, og Maud Poulsen, kommunuskrivara, heimild til saman við borgarstjóranum, Karl A. Olsen, at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t.

**Viðv. mál 3**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 4**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um umsókn frá Evald Haldansen, Hans Paula Haldansen og Mariu Petersen um sundurbýti av matr. nr. 195f.
J.nr. 2009-011
Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. mál 4**
Tilmælið einmælt samtykt.

**Mál 5**
Tilmæli frá somu um játtan til uppseting av gøtuljósum Undir Holmsbakka.
J.nr. 2009-018
Nevndin mælir til at gera arbeiðið sambært metingini, og at 200.000 kr verða játtaðar til arbeiðið av kontu 70. Íløgur til teknisk mál.

**Viðv. mál 5**
Áheitan er komin frá formanninum í teknisku nevnd um at beina málið aftur í nevndina.
Áheitanin einmælt samtykt.

**Mál 6**
Tilmæli frá Mentanarnevndini um áheitan frá Storsudret á Gotlandi um vinarbýarsamstarv.
J.nr. 2009-027
Nevndin mælir Bygdarráðnum til at taka støðu í málinum.

**Viðv. mál 6**
Karl A. Olsen mælti til, at Vestmanna Kommuna bjóðar seg fram sum vinarbýur hjá Storsudret á Gotlandi.
Tilmælið einmælt samtykt.

# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 27. januar 2009, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Karl A. Olsen, Herit Magnussen, Pauli T. Petersen, Jón Mikkelsen, Evelyn Gaard, Bárður Poulsen og Siri S. Niclassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

**Mál 7**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini um stuðul til Dagtilhaldið, nú stuðulin til umsorganararbeiði frá landsmyndugleikunum er strikaður.
J.nr. 2009-004
Nevndin mælir til at játta 40.000 kr av rakstrarkontu 542040 “Stuðul og aðrar útreiðslur á trivnaðar og umhvørvisøkinum” til dagtilhaldið.

**Viðv. mál 7**
Tilmælið einmælt samtykt.

Bókin lisin

Fundur lokin kl. 20.45.

Sign.:

Karl A. Olsen Herit Magnussen Pauli T. Petersen Jón Mikkelsen

Evelyn Gaard Bárður Poulsen Siri S. Niclassen